gult cyan magenta svart



# Ársins herðaklapp

**Á hvørjum ári fer Leikpallur Føroya at geva einstaklingi ella felagi eina virðisløn fyri serstakt avrik innan sjónleik í Føroyum**

HERÐAKLAPP
*Stefan í Skorini*

Sjónleikaumhvørvið er sera virkið í løtuni, og nógvar framførslur eru á skránni í næstum. Hóast nógv virksemi á økinum, so metir Leikpallur Føroya tað vera neyðugt at varpa enn meira ljós á sjónleikin.

Tí hevur Leikpallur Føroya tikið stig til at lata eina virðisløn á hvørjum ári á Grækarismessu. Virðislønin verður nevnd "Ársins herðaklapp", og tann útnevndi fær umframt heiðurin eina peningagávu á 6.000 krónur. Peningurin er ætlaður sum ískoyti til uttanlandsferð at hyggja eftir sjónleiki.

Harafturat verður ein lutur latin sum minni um herðaklappið. Tað er ein skortur ella ein gríma, sum liggur á Føroya Fornminnissavni. Skorturin er úr Oyndarfirði, haðani hann kom á fornminnissavnið í 1931.

Eingin ábending er um, hvussu gamal hesin skortur er, hvørjum húsi hann er úr, ella í hvørjum sambandi hann hevur verið nýttur. Eingin ivi er tó um, at hann hevur verið nýttur í grýluleiki í fornari tíð. Er nakar, ið veit meira at siga um skortin, so sigið vinarliga fornminnissavninum frá.

Til at gera av, hvør skal fáa herðaklappið er ein nevnd við trimum limum sett. Leikpallur Føroya hevur tveir limir, meðan Føroya Blaðmannafelag hevur ein lim. Limirnir eru Dánjal Joensen, formaður, Dagny Joensen, skrivari og Karin Kjølbro.

Hetta er fyrstu ferð, at herðaklappið verður latið, og í ár er tað ein einstaklingur, ið verður heiðraður. Hetta er ein persónur, sum hevur sýnt serlig avrik í farnari tíð. Í framtíðini skal herðaklappið latast fyri avrik í tí seinasta árinum.

Hvør, ið fær henda heiðurin, verður avdúkað Grækarismessudag 12. mars kl. 18.00.



*Skorturin, ið verður latin sum minni um ársins herðaklapp, er úr Oyndarfirði. Hann varð latin fornminnissavninum í 1931*

# Munur gjørdur á ferðafólki

**Kemur tú til Føroya við flogfari í háárstíðini, er verri enn so vist, at tú fært seingjarpláss á Hotel Føroyum ella vallaraheiminum hjá Smyril Line, hóast tómar sengur eru**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Fólk, sum koma til Føroya við flogfari um summarið, kunnu rokna við at verða avvíst á Hotel Føroyum og Vallaraheiminum í Tórshavn*

Smyril Line leggur alt Vallaraheimið Tórshavn og part av Hotel Føroyum av til ferðafólk, sum ferðast við Norrønu. Og fólk, sum koma við flogfari, kunnu væl rokna við at verða avvíst á hotellinum og vallaraheiminum, hóast tómar sengur eru.

Keldur í ferðavinnuni, sum Sosialurin hevur tosað við, halda tað vera rættiliga løgið, helst eindømi í heiminum, at gistingarhús vísir fólki frá sær, hóast pláss er fyri teimum.

Tað er komið fyri, verður sagt, at ferðafólk, sum koma til Hotel Føroyar og Vallaraheimið Tórshavn, verða avvíst við teirri grundgeving, at plássini eru løgd av til fólk, sum koma við Norrønu.

Tað kann ikki passa, verður ført fram, at tað finst gistingarhús, sum ikki vil hava fólk at gista.

Men tað passar kortini partvíst. Men tí heldur eigarin ikki nakað løgið vera í.

Tað er Smyril Line, sum eigur Hotel Føroyar og Vallaraheimið Tórshavn við Oyggjarvegin.

## Umhugsað skipan

Áki Jespersen, ferðafólkaleiðari á Smyril Line, sigur, at tey hava gjørt hesa skipanina fyri at tryggja teimum, sum ferðast við Norrønu, innivist, meðan tey eru í Føroyum.

Hetta er gjørt við beráddum huga fyri at fáa fleiri ferðafólk at sigla við Norrønu, sigur hann.

Tó er tað ikki heilt rætt, at ikki slepst inn á Hotel Føroyar. Nøkur seingjarpláss eru altíð tøk, sigur Áki Jespersen.

Áki Jespersen heldur ikki, at tað er vánalig forrætning at vísa ferðafólki frá sær, tí plássini eru markað til ávís onnur ferðafólk.

Tað, sum gjørt verður í hesum førinum, er at Smyril Line roynir at fáa so nógv fólk sum gjørligt at ferðast til Føroya við Norønu. Og felagið selur so lidnar loysnir til fremmandu ferðafólkini.

Tí hevur Smyril Line lagt alt vallarheimið og partar av hotellinum av til síni egnu umboð, sum so altíð hava pláss fyri teirra kundum, tá teir koma til Føroya.

– Her kunnu vit bjóða teimum alt í einum. Bæði flutning og gisting. Tí er tað, at Smyril Line hevur fingið sær hotel og vallaraheim, sigur Áki Jespersen.

Hann vísir annars á, at tað eru alt ov fá seingjarpláss í landinum, so um Smyril Line ikki hevði hesa skipanina, var eingin trygd fyri, at tey, sum komu við Norrønu, sluppu at gista. Tað kundi so gjørt, at tey settust aftur, og so vóru tey mist.

Áki Jespersen metir ikki, at Hotel Føroyar ella Vallaraheimið Tórshavn hava sett pengar til av hesi skipanini.

Tað er ikki fremmant aðrastaðni heldur, vísir Áki Jespersen á, at flutningsfeløg hava hotel til sínar egnu gestir. Hann sipar til eitt nú SAS hotellini ymsastaðni.

Men hann kann ikki siga fyri vist, um SAS eisini vísir fólki frá sær, sum ikki hava ferðast við »rætta flutningsfelagnum«.

## Góð útlit

Áki Jespersen fegnast annars um, at útlitini fyri komandi summar eru góð. Hann sigur, at tað sær út til, at bíleggingarnar fara at verða fleiri enn undanfarin ár.

Longu nú er »belegningurin« oman fyri 20 prosent, sigur hann. Og tað er nógv so tíðliga á árinum. Hetta er galdandi bæði fyri skip og gistingarhús.

Gongdin tykist tann sama á øllum marknaðum, sigur Áki Jespersen. Í Danmark, Noreg og Týsklandi, sum hann tekur sum dømi.

Tó hevur hann lagt merki til, sigur Áki Jespersen, at ferðafólktalið er nógv størri í juni og august, enn tað er í juli, uttan at hann tó kann nevna nakra heilt ítøkiliga grund til, at so er.

Hann sigur, at Hotel Føroyar onkuntíð hevur havt láárstíðar prísir í juli mánað fyri at lokka fólk at gista á hotellinumø Men tað verður neyvan gjørt í ár, metir hann.








# Anna Klett og Deborah Wood

Ein tann dúgligasti instrumentalsolistur okkara á tí klassiska økinum klarinettleikarin Anna Klett, verður at hoyra í Runavík og í Norurlandahúsinum, ávíkavist hósdagin 8 mars kl. 19:30 og leygardagin 10 mars kl.16:00.

Anna kemur higar saman við klaverleikaranum Deborah Wood, sum er frá Amerika.

Tær hava fingið sera góðar móttøkur og eru róstar upp um skýggja, síðani tær tóku saman í duoina "KlettWood Duo".

Kritikkarar hava skriva: "Tann danski kamartónleikapallurin er vorðin ríkari, tá Wood og Klett blivu til "KlettWood", og "Hvør sær spæla tær sum einglar, saman sum allir himmalsins einglar".

Øll verkini á skránni eru sera krevjandi, fýra teirra eru hornasteinar í 20-aldar verkum, t.e. franski Debussy, poski Lutoslavski, enski Maxwell-Davies og danski Per Nørgård. Harafturat spæla Anna og Deborah nýskrivaði verk eftir Pascal Garnichat og Klaus Ib Jørgensen, sum verða frumframførd í Føroyum.



# Sjúka hækkar fiskaprís

Kreppan í kjøtídnaðurin í Europa og serliga í Bretlandi hevur ført við sær, at brúkarin er farin av hyggja eftir alternativum til kjø. Her er flogfenaður og fiskur ovast á skránni. Norðmenn hava í seinastu viku skotið upp, at teir skulu útnytta støðuna í Bretlandi til at fáa fólk í Europa at eta enn meira fisk. Men røddir eru eisini frammi í Noregi um, at hetta er skeiv mannagongd, tí at fara at nýta støðuna til at seta fiska upp móti kjøti, kann geva bakslátttur. Mótstøðumenninir siga, at fólk skulu velja fisk, tí tey halda fiskur er góður og ikki tí at kappingarvinnan hevur trupulleikar av sjúku í løtuni.

Longu nú síggjast fyrstu tekini á fiskauppboðsølum í Europa, at fiskurin hækkar orsakað av munn og kleyvsjúkuni.

# Fiskavirkini spesialiserað seg

**Seinasta árið hava Føroya Ráfiskakeyparafelag og Føroya Ráfiskaseljarafelag saman við Fiskamarknaði Føroya arbeitt við at standardisera viðurskiftini viðvíkjandi landing av fiski**

Vinnuhúsið skrivar, at seinasta árið hava Føroya Ráfiskakeyparafelag og Føroya Ráfiskaseljarafelag saman við Fiskamarknaði Føroya arbeitt við at standardisera viðurskiftini viðvíkjandi landing av fiski og landing o.ø. Arbeiðið er nú liðugt og reglugerðirnar komu í gildi 1. mars.

Strukturellar broytingar eru farnar fram í føroysku fiskivinnuni seinnu árini. Skipini eru loyst frá virkjunum og meginparturin av fiskinum verður bjóðaður út til allar fiskakeyparar. Uppboðssølur og landingarmiðstøðir eru settar á stovn, sum hava til høvuðsuppgávu at selja og distribuera fisk um landið. Sum úrslit av hesi umstrukturering hava føroysku fiskavirkini spesialiserað seg í ávísum framleiðslum.

## Flyta meiri fisk

Ein avleiðing av spesialiseringini, sum er farin fram á fiskavirkjunum og stovnanini av uppboðssølum og landingarmiðstøðum er, at fiskur verður fluttur um oyggjarnar í nógv størri mun enn fyrr. At fiskurin verður landaður og hagreiddur á einum stað og fluttur um landi til virkingar hevur gjørt at tørvur er á at fáa standardisera nøkur viðurskifti.

Endamálið við reglugerðunum er at skipa viðurskiftini viðv. landing og hagreiðing av fiski frá tí fiskurin verður landaður, til hann er komin til framleiðaran, soleiðis at seljarar og keyparar fáa eins tænastu á øllum landingarstøðum í landinum, skrivar Vinnuhúsið.

# Bretar leggja kjøt inn undir seg

Kjøtgoymslurnar eru við at ganga undan í Bretlandi. Í vikuskiftinum var einki kjøt at fáa í stórum handilshúsum, tí bretar eru farnir at leggja kjøt inni undir seg. Teir rokna við at ringt verður at fáa hendur á kjøti í framtíðini og at prísurin fer at fara upp i loft, skriva bretsk bløð.

Tað er ikki vandamikið at eta neytakjøt, sjálvt um munn og kleyvsjúka herjar, sigur landdjóralæknin.

# Óvissa um Nólsoyarkaðalin

Ein partur av kaðalinu, sum Christian í Grótinum dróg við sær úr Nólsoyrafirði og norður á Fuglafjørð, liggur nú á goymsluni hjá SEV í Skálafirði. Enn hevur SEV ikki kannað, hvussu stendur til við tí sum liggur eftir av kaðalinum í Nólsoyarfirði, men teir rokna við, at hann er illa farin. Kaðalin er nógv strektur, áðren tað slitnaði. Christian í Grótinum var so óheppin, tá teir sigldu heim av svartkjaftaleiðunum vestan fyri Írland, at annað ankarið hekk niðri. Teir varnaðust einki, og tá teir komu á grunt í Nólsoyarfirði, tók ankarið í botn og dróg kaðalin við sær. Christian í Grótinum var fulllastaður og við teimum 7000 hestunum í maskinrúminum merktist einki á skipinum, sjálvt um tungi kaðalin hekk uppi í skipinum.

Nólsoyingar fáa nú streym frá einum motorverki í oynni.




Heimurin broytist hvønn einasta dag. Tí mást tú gera teg til reiðar at fylgja við. Handilsskúlin hevur alla ta nýggjastu kunningartøknina og brynjar teg til framtíðina. Uttan mun til um tú eftir Handilsskúlan velur eina hægri útbúgving sum t.d. løgfrøði ella búskaparfrøði ella fert beinleiðis út í vinnulívið. Uttan mun til um tú velur FHS ella Hægri Handilsskúla. Handilsskúlin gevur tær

**Hví taka annað, tá tú kanst fáa bæði?**

FØROYA HANDILSSKÚLI

Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn, Tel 31 71 77
Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, Tel 44 49 00